# Tosa føroyskt við íslendingin, Bergur!

EYÐUN Á BORG



**Á Borg á Argjum undan fyrsta vetrardegi 2008**

Bergur var so argur um, at íslendingur hevði tosað enskt við hann á flatlondum, at Bergur svaraði aftur á donskum ella kanska gøtudonskum. Um íslendingar duga "nóg væl" danskt, er neyvan nakað, sum vit føroyingar skulu gremja okkum um. Íslendingar læra danskt í skúlanum, so teir munnu klára tað, sum teir halda seg hava brúk fyri á málsliga økinum.

FØROYSKT OG ÍSLENDSKT ERU SYSTKIN. FØROYSKT OG DANSKT ERU TRÍMENNINGAR: Tískil átti ein føroyingur at tosað føroyskt við ein íslending og íslendingurin íslendskt við føroyingin!? Tað ber til við einum góðum vilja. So, Bergur, tosa føroyskt við íslendingin! Og gøtudanskt, um á stendur.

Hvussu nógv gera vit annars við íslendskt í føroyska fólkaskúlanum í dag? Íslendskur tekstur og bond hoyrdu til ta gomlu føroysku lesibókina.

Hoyrdi um føroyskar og norskar unglingar, sum tosaðu enskt sínámillum! Tað virkar eitt sindur løgið. Har mátti borið til at tosað gøtudanskt/skandinaviskt. Jú, tað kann vera hent at duga danskt, men neyvan hent at duga tað betur enn føroyskt!?

Hoyri av og á fjølmiðlafólk tosa flótandi danskt við norðmenn og sviar. Tað er marghåttligt. Kanska eru vit so dansklig nú, at vit ikki duga gøtudanskt longur!? Tað er spell. Í dansktímunum plaga vit onkuntíð, men kanska ov sjáldan, at lesa/tosa gøtudanskt. Kanska áttu allir dansklærarar at gjørt tað av og á. Soleiðis kundu vit møguliga styrkt tað skandinaviska.

**E.S.:** Hatta lánið til íslendingar, sum er frálíkt, er annars ikki nógv at tosa um, tá vit hugsa um virðið á fiskirættindunum, sum vit hava fingið frá íslendingum í mong ár!

Við norðurlendskari kvøðu

# Hvussu fer landsstýrið at tryggja ES borgarar?

SJÚRÐUR SKAALE
Løgtingsmaður



**Skrivligur fyrispurningur til Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í innlendismálum**

**Spurningur:**
Hvørji stig fer landsstýriskvinnan í innlendismálum at taka til tess at tryggja, at ES borgarar, sum eru við føroyskum skipum, beinanvegin koma undir somu skipanir og fáa somu rættindi sum føroyingar, ið eru við somu skipum?

**Viðmerkingar:**
Tað hevur leingi staðið á at fáa manningar til ein part av føroyska fiskiflotanum. Til tess at fáa skipini mannað, kemur væl við, at til ber at fáa útlendingar at mynstra.

Eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi hevur leingi verið so stórur, at vit hava fingið eina fyritøku, sum stendur fyri at skapa sambond millum føroyska arbeiðsmarknaðin og útlendska arbeiðsmegi.

Við teirri lógarbroyting, sum við kongaligari fyriskipan varð framd fyrr í ár, skuldi verið rættiliga einfalt og smidligt at fingið arbeiðsmegi úr ES-londunum til Føroya.

Men nýggja lógin virkar als ikki eftir ætlan.

Tað er ein stórur trupulleiki, at fólk, sum koma úr ES-londum at manna føroysk fiskiskip, ikki beinanvegin koma inn í tær serskipanir, sum eru galdandi fyri sjófólk.

Spyrjarin kennir fleiri dømi um polakkar, sum eru við føroyskum fiskiskipum, men ikki fáa minstuløn, og heldur ikki av sær sjálvum koma undir tær serligu skattareglur, sum eru galdandi fyri føroysk sjófólk.

Sum skilst er orsøkin, at útlendingarnir ikki fáa føroyskt p-tal, og tí ikki kunnu skráseta seg í teirri kommunu har teir búgva. Tískil hava teir heldur ikki rætt til kommunlæknahjálp og aðrar tænastur.

Hetta setir reiðararnar í eina sera keðiliga støðu mótvegis hesum monnum. Tað fær føroysku manningina, sum er umborð á somu skipum, at kenna seg illa. Og tað er lítið sømiligt fyri okkum sum land, at arbeiðsfólk, sum koma higar, ikki fáa somu sømdir sum teirra føroysku starvsfelagar og onnur fólk í landinum – samstundis sum vit áleggja hesum útlendingum at rinda fullan skatt.

# Oyndfirðingar og skálafólk skuldu velja á Strondum

**Hóast skúlastýrisnevndin á Stronum spurdi Mentamálaráðið, um lokalu skúlastýrisnevndirnar á Skála og í Oydarfirði kundu sleppa at avgreiða valið til Stranda skúla saman við lokala skúlastýrisvalinum, sluppu tey ikki tað. Skúlabørn á Skála og í Oyndarfirði ganga í framhaldsdeild á Strondum**

**SKÚLASTÝRISVAL**

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Sum í flestu øðrum skúlum, var val til skúlastýrið til Stranda skúla, hildið saman við kommunuvalinum.

Í Stranda skúla ganga, umframt næmingar úr Sjóvar kommunu, eisini næmingar av Skála, úr Oyndarfirði og úr Skálafirði.

Skúlastýrisvalnevndin bað Mentamálaráðið um loyvi til, at lokalu skúlastýrisvalnevndirnar á Skála og í Oyndarfirði fingu loyvi til at avgreiða valið til Stranda skúla saman við valinum til teirra lokala Skúlastýrið.

Hetta bar sambært galdandi lóg ikki til – skúlastýrið til Stranda skúla skuldi veljast á Strondum.

Hetta kann hugsast, at verða viðvirkandi til, at valluttøkan ikki var størri enn hon var.

Ein lítil helvtin av teimum foreldrum ið høvdu valrætt til skúlastýrið greiddu atkvøðu.

Úrslitið frá skúlastýrisvalinum var hetta.

- Eyðleyg í Garði, Strendur, 46 atkvøður
- Joan Sandursdóttir, Strendur, 26 atkvøður
- Artur Johansen, Strendur, 19 atkvøður
- Birgit Frederiksberg, Strendur, 15 atkvøður
- Christian Weihe, Skáli, 11 atkvøður
- Jan Abrahamsen, Strendur, 5 atkvøður
- Maria M. Djurhuus, Morskranes, 4 atkvøður
- Tummas Eli H. Joensen, Strendur, 2 atkvøður

Sostatt eru Eyðleyg í Garði, Joan Sandursdóttir og Artur Johansen vald sum foreldraumboð í skúlastýrið fyri Stranda skúla.

# Sosialisering av føroyingum á dagsskrá

**Mikudagin fer Turid Olsen í fyrilestri at greiða frá gransking, sum hon higartil hevur verið við í, og hvørjar ætlanir hon hevur um at granska meiri í evninum**

Mikudagin klokkan 12.30 verður áhugaverdur almennur fyrilestur á Føroya Læraraskúla. Tað er Turid Olsen, cand. mag. í pedagogikki, sum fer at fyrilesa um gransking í sosialisering av føroyskum børnum og ungdómum.

Fyrilesturin, sum við steðgum fer at vera umleið tríggjar tímar, er ætlaður lærarum, pedagogum, lærararalesandi og pedagoglesandi og annars øllum teimum, sum eru áhugað í evninum.

Turid, sum er ættað úr Havn og búsitandi í Keypmannahavn, fyrireikar eina phd verkætlan, sum hon nevnir "Komparative studier af børns socialisering på Færøerne".

Í fyrilestrinum fer hon fyrst at tosa um tilrættalegging av kvalitativari gransking og um forkanningar til gransking. So fer hon at greiða frá, hví hon fekk áhuga fyri at granska í sosialisering í Føroyum, um ástøði til útgreining av sosialiseringini og um úrslit og ábendingar higartil. At enda fer hon at greiða frá, hvussu hon ætlar at halda fram við granskingini og harvið phd verkætlanini.

# Eidesgaard sáar split

SJÚRÐUR SKAALE
Vegna tingbólk Tjóðveldisins



Tingbólkur Tjóðveldisins tekur frástøðu frá teimum sera ódamligu álopum á Tjóðveldi, sum Jóannes Eidesgaard gjørdi á landsfundi Javnaðarfloksins um vikuskiftið.

Vit skilja ikki hvat formaður Javnaðarfloksins vil við hesum, og harmast um tann skaða, hansara atburður elvir til.

Vit halda eisini at annað og týdningarmeiri átti verið at tikist við í føroyskum politikki í hesum døgum enn tað, sum Jóannes Eidesgaard borðreiddi við um vikuskiftið.